| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 6550.21 |
| **Heiti**<br>***Title*** | Skeið í starvslæruvegleiðing og akkersfólkauppgávuni – læraraútbúgvingin<br><br>*Course in practice guidance and mentoring – teacher training* |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 15 ECTS |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Læraraprógv og 2 ára starvsroyndir |
| **Stig**<br>***Level*** | B.Ed-støði |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | Endamálið við skeiðnum er at gera tann lesandi føran fyri (1) at vegleiða læraralesandi, ið koma í starvslæru og (2) at leiðbeina nýútbúnum lærarum fyrsta undirvísingarárið. |
| **Innihald**<br>***Content*** | Skeiðið er í 9 sjálvstøðugum og tó samanhangandi pørtum. Partarnir eru hesir:<br>- Hin føroyski fólkaskúlin og hin føroyska læraraútbúgvingin<br>- Læraraútbúgvingin í 2020unum<br>- Góð undirvísing og góðir undirvísarar<br>- Almendidaktisk temu og almendidaktiskar avbjóðingar<br>- Fakdidaktisk temu og fakdidaktiskar avbjóðingar<br>- Vegleiðingarástøði og ástøði um akkersfólkaskipanir<br>- Etisk atlit í sambandi við vegleiðing og eftirmeting<br>- Starvslæran sum eitt serligt lærurúm í læraraútbúgvingini<br>- Avbjóðingar hjá nýútbúnum lærarum<br>- |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Vit undirvísa triðja hvønn hósdag.<br><br>Vit nýta fyrilestraundirvísing, samstarvslæru, bólkaarbeiði, greining av casum, kjakbólkar, upplegg frá skeiðsluttakarum, stutt skrivlig avrik, sjálvlestur, Zoom-fyrilestrar osfr.. |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Tá ið skeiðið er lokið, skal tann lesandi verða førur fyri at<br>- greiða frá, hvussu læraraútbúgvingin er skipað, og hvønn leiklut starvslæran og starvslærarin hevur í samlaðu útbúgvingini<br>- gera mun á ymiskum vegleiðingar- og mentorástøðum og hættum, og taka støðu til, nær ein vegleiðingartilgongd er betri egnað enn ein onnur<br>- lýsa hvørjar avbjóðingar starvslesandi og nýútbúnir lærarar ofta hava, tá ið tey skulu skipa undirvísingina<br>- meta um, hvørjar førleikar lesandi/nýútbúnir lærarar hava, tá ið tað snýr seg um (1) at leiða ein flokk, (2) at skapa gott samband |

| | |
|---|---|
| | við einstaka næmingin í flokkinum, og (3) at skapa eina innihaldsríka og næmingalagaða undirvísing<br>- skipa fyri konstruktivum ráðleggingartímum/akkersfólkasamrøðum, har ið týdningarmiklir partar av lærarastarvinum fáa umrøðu<br>- eftirmeta undirvísingina hjá læraralesandi og nýútbúnum lærarum og at orða ítøkilig tilmæli. |
| **Próvtøkuháttur** ***Assessment method*** | Próvtøkan er tríbýtt<br>(1) Tey lesandi skulu hava lærarlesandi í starvslæru, meðan skeiðið gongur og dokumentera, hvussu tey hava skipað samstarvið frá byrjan til enda. Hetta arbeiðið skal verða góðtikið av undirvísarunum, áðrenn endaliga uppgávan verður skrivað<br><br>(2) Tey lesandi skulu skriva eina stutta akademiska uppgávu (7-10 blaðsíður), sum tekur støði í einum ella fleiri avbjóðingum, ið eru tengdar at starvslæruvegleiðaraleiklutinum og/ella leiklutinum sum akkersfólki. Teksturin skal leggjast fram munnliga.<br><br>(3) Framløgudagin fáa skeiðsluttakarnir til uppgávu at vera opponentar hvør hjá øðrum. |
| **Próvdøming** ***Examination*** | Innanhýsis próvdøming |